LM-106/2020

Fylgiskjal 6

januar
LØGGILT GRANNSKODANARVIRKI

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Tinganes

Tórshavn, tann 22. desember 2020

Hoyringsskriv í sambandi við broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar, grannskoðaravirkir og gildiskomu av ES fyriskipan nr. 537/2014 frá 16. apríl 2014

Felagið Føroyskir Grannskoðarar (FFG) hevur latið inn hoyringsskriv viðvíkjandi broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar, grannskoðaravirki, og løgtingslóg um at seta í gildi ES fyriskipan nr. 537/2014 frá 16. apríl 2014. Felagið hevur tó gjørt vart við, at limir eru ikki á einum máli um reglurnar um firmarotatión, sum eru settar inn í § 6, stk. 2 og 3 í lógina um gildiskomu av ES fyriskipanini. FFG hevur tí ikki gjørt viðmerkingar til hendan partin, men letur tað standa upp til limafeløgini at gera viðmerkingar.

Vit taka undir við viðmerkingunum hjá FFG, men eftir okkara fatan er føroyski marknaðurin ikki egnaður til firmarotatión, og vit skulu nýta høvi til at gera okkara viðmerkingar til hendan partin av lóggávuni.

Rotatiónsreglur
Reglurnar um firmarotatión umfata fyritøkur av serligum almennum áhuga. Hesi eru bankar, tryggingarfeløg og feløg, ið eru skrásett á keypsskála. Í verandi løtu eru í Føroyum 4 bankar, 8 feløg, ið veita tryggingartænastur, umframt 1 haldfelag, og 2 feløg, ið eru skrásett á keypsskála, tilsamans 15 feløg.

ES fyriskipanin, ið ætlanin er at seta í verk, er gjørd til at regulera europeiska marknaðin, ið telur 580 mill. brúkarar herundir Danmark, ið man vera tað einasta landið, vit á nakran hátt kunnu samanbera okkum við. Støddarlutfallið er áleið 1 til 100, men vinnulóggávan er á flestu økjum javnfjar.

Ein fylgja av fíggjarkreppuni, sum herjaði frá 2008 til 2010 var, at reglurnar um fyrisiting av fíggjarfyritøkum vóru herdar munandi . M.a. komu myndugleikarnir eftir, at neyðugt var við serligum royndum og førleikum at grannskoða fíggjarfyritøkur. Krav varð sett um, at grannskoðarar, ið grannskoða fíggjarfyritøkur skulu hava serliga sertifisering. Fyri at verða sertifiseraður, skal grannskoðarin skjalprógva royndir í grannskoðan av fíggarstovnum, umframt at teir skulu lúka ávís krøv um eftirútbúgving.

Hesi krøv eru:
- Royndir frá grannskoðan av fíggjarstovnum í minsta lagið 450 tímar seinastu 5 árini
- Luttøka í serligum eftirútbúgvingarskeiðum í minsta lagi 20 tímar árliga

Hetta hevur bakstøði í, at tað verður hildið at verða eitt týðandi samfelags áhugamál, at fíggjargeirin verður grannskoðar av grannskoðarum, ið hava serkunnleika og dyggastu royndirnar á hesum øki.

ÓÐINSHÆDD 13
P.O. BOX 30
FO-110 TÓRSHAVN
FAROE ISLANDS

TEL +298 31 47 00
FAX +298 35 17 01

JANUAR@JANUAR.FO
WWW.JANUAR.FO

Fíggjargeirin er danskt málsøki sambært heimastýrislógini, og danska stjórnin hevur eisini sett hesar reglur í verk at galda í Føroyum.

Í Danmark er grannskoðan av fíggjarfyritøkum savnað hjá 4 grannskoðanarfyritøkum, ið eru donsku deildirnar av altjóða grannskoðanarfyritøkunum, teimum sonevndu "Big-Four". Hesar hava á leið eins nógvar uppgávur á hesum økinum, og teirra atkoma at byggja upp og viðlíkahalda neyðugar førleikar og royndir á økinum kunnu javnsetast.

Rotatiónsreglurnar gera, at grannskoðanaruppgávurnar verða bjóðaðar út við millumbilum og flyta sostatt millum fyritøkurnar. Av tí at allar hava eitt ávíst tal av slíkum uppgávum broytir, hetta ikki stórvegis um møguleikarnar hjá einstøku grannskoðanarvirkjunum, framhaldandi at bjóða seg fram á hesum øki. Fyritøkurnar umboða áleið somu førleikar og royndir, og hetta ávirkast ikki av, at einstøku uppgávurnar koma og fara.

Á føroyska marknaðinum eru í løtuni 15 fyritøkur av serligum almennum áhuga (PIE fyritøkur). 3 grannskoðanarfyritøkur í Føroyum lúka førleikakrøvini til at grannskoða hesar fyritøkur.
Dags dato hava 15 av PIE fyritøkunum hava valt somu grannskoðanarfyritøku, P/F Januar, meðan 1 hevur valt Spf/Numo.

Viðvíkjandi fíggjarfyritøkum eru í løtuni eru 4 grannskoðarar, ið eru sertifiseraðir av fíggjareftirlitinum at grannskoðað føroyskar bankar. Av hesum eru 2 knýttir at Januar, ið er grannskoðari hjá 3 teimum størstu bankunum í Føroyum, 1 er valdur grannskoðara hjá minsta peningastovninum, meðan 1 í løtuni ikki loysir slíkar uppgávur, men varðveitir sertifiseringina við royndum frá øðrum fyritøkum, ið eru góðkendar til at veita tímar.

Harumframt er ein nýútbúgvin statsautoriseraður grannskoðari í Januar, sum í síni útbúgvingarleið hevur royndir frá hesum uppgávum. Munandi kunnleikar og royndir til at taka sær av hesum eru sostatt bygdar upp og mentar í P/F Januar.

Um reglurnar um firmarotatión verða settar í gildi, fer tað at taka burtur møguleikan fyri, at fíggjarligar fyritøkur kunnu velja tað grannskoðanarvirki, sum í løtuni hevur drúgvastu royndirnar við. 3 av 5 sertifiseraðum grannskoðarum í Føroyum verða forðaðir í at luttaka í hesum arbeiði framyvir, meðan 2 sertifiseraðir grannskoðarar knýttir at hvør sínum virki, kunnu halda fram.

Tey, sum roteraðu burtur í fyrsta umfarið hava ikki møguleikan at varðveita sertifiseringarnar, av tí, at tey ikki longur uppfylla kravið um viðkomandi royndir, tá eitt stutt áramál er farið. Tað merkir, at eftir stutta tíð verða bert 2 grannskoðarar eftir í Føroyum, ið vera sertifiseraðir at grannskoða fíggjarstovnar.

Hetta fer í fyrsta umfari við lóggávu at skapa eina duopol-støðu í Føroyum, har bert 2 grannskoðarar kunnu býta hesar uppgávur ímillum sín. Tað er helst óneyðugt at siga, at tað verður trupult at halda kappingarlóggávuna.

Men her skal serliga havast í huga, at tey grannskoðanarvirki, ið verða vald, tá lóggávan fær virknað, skulu eisini rotera burtur aftur eftir einum áramáli. Tá er eingin sertifiseraður grannskoðari eftir í Føroyum, sum kann lata seg velja til grannskoðara hjá føroysku fíggjarstovnunum.

Tá eru ikki longur grannskoðarar í Føroyum, ið kunnu átaka sær uppgávuna at grannskoða fíggjarfyritøkur og hava hesar fyritøkur ikki aðrar møguleikar enn at fara av landinum við hesum uppgávum.

Førleikar, royndir og útbúgvingar, ið føroyskar fyritøkur ígjøgnum fleiri ár hava uppbygt verða burtur, eins og førleikakrevjandi størv, ið føroyskar fyritøkur í dag eru førar fyri at røkja, verða flutt av landinum sum ein beinleiðis fylgja av føroyskum lógarverki.

Vit eru vísir í, at hetta var ikki ætlanin við at seta hesar lógarreglur í gildi í Føroyum.

Í løtuni eru 2 børsskrásettar fyritøkur í Føroyum, sum ikki eisini eru umfataðar av PIE hugtakinum av øðrum áum. Hesar nýta báðar sama grannskoðanarvirki, P/F Januar, ið soleiðis hevur nýtt munandi tilfeingi at menna servitan og útbúgva starvsfólkið í teimum krøvum, ið grannskoðan av børsskrásettum fyritøkum setur.

Um reglurnar um firmarotatión verða settar í gildi merkir tað, at einastu grannskoðarar í Føroyum, ið hava royndir við hesum uppgávum, verða avskornir frá tí í framtíðini, og grannskoðarar, ið kunnu bjóða seg fram hava ikki havt royndir við hesum seinastu 12 árini.

Tað er trupult at siggja, hvussu føroyska samfelagið verður betur farið av hesum.

Myndugleikarnir hava seinnu árini, og serliga síðani fíggjarkreppuna lagt áherðslu á, at grannskoðarar, ið grannskoða samfelagsliga týdningarmiklar fyritøkur, skulu hava hægstu førleikar og royndir á økinum. Hetta er beinleiðis lógarregulerað í Lov om Finansielle Virksomheder.

Reglurnar um firmarotatión virkar ímóti hesum, og er ein forðing fyri, at føroyskar grannskoðanar-fyritøkur kunnu varðveita hægstu førleikar uppá longri sikt.

Tað er trupult at fáa eyga á, at føroyska samfelagið hevur áhuga í, at teir førleikar og royndir, ið bygdar eru upp í Føroyum á hesum økinum, ikki longur skulu gagnnýtast og fara fyri skeyti.

Skiftisreglur

Vit hava omanfyri víst á, at reglur um firmarotatión fara at hava munandi neiliga ávirkan á menningarmøguleikarnar hjá grannskoðanarvinnuni í Føroyum. Um firmarotatión skal setast í gildi í Føroyum, er tað eftir okkara fatan umráðandi, at vinnan fær eina munagóða skiftistíð at gera seg til reiðar at møta hesi avbjóðing.

Í Danmark, sum helst er einasta landið í ES ið vit kunnu samanbera okkum við, vóru eisini skiftisreglur, tá ið firmarotatión varð sett í gildi. Niðanfyri hava vit samanborið skiftisreglurnar sambært fyriliggjandi

uppskoti við skiftisreglunum, sum vóru galdandi í Danmark. Talan er um áramál eftir ígildiskomuna (sum í FO er ætlað at vera 1. juli 2021).

Valtíðarskeið	Uppskot FO	Danmark
20 ár ella fleiri	4 ár	6 ár
Millum 11 og 20 ár	7 ár	9 ár
Minni enn 11 ár	Eingin	2 ár

Tað undrar okkum stórliga, at skiftisreglurnar eru styttri í Føroyum, sum er uttanfyri EU, enn skiftisreglurnar vóru í Danmark, sum er partur av EU, samstundis, sum at ávirkanin á føroysku grannskoðaravinnuna er munandi størri enn teirri donsku.

Vit halda ikki, at hetta er rætt, og skulu mæla til, at reglurnar verða munandi longdar. Eftir okkara fatan er ein tvífalding hóskandi.

Avrunding
Sum støðan er í dag, so er P/F Januar grannskoðari hjá øllum PIE-fyritøkum í landinum uttan einari. Sostatt er hetta í veruleikanum ein lóggáva, sum beinleiðis avmarkar vinnumøguleikarnir hjá **einari** fyritøku í vinnuni. Hetta halda vit ikki er rætt.

Vit eru greiðir yvir, at onkur kann halda, at endamálið hjá P/F Januar við hesum hoyringsskrivi bert er at forða fyri at missa munandi umsetning. Vit skulu gera vart við, at marknaðurin fyri grannskoðara-veitingum hevur verið merktur av harðari kapping seinnu árini. Um slík argument skulu takast við í metingina skal tí eisini havast í huga, at fyri kappingarneytar okkara er tað helst áhugavert, at P/F Januar er burtur úr kappingini á einum marknaðarsegmenti, har Januar hevur staðið sterkt seinnu árini.

Tað er tí okkara fatan, at hesar reglur hava so neiligar samfelagsligar fylgjur við sær uppá longri sikt, at tær eiga ikki at vera settar í verk í Føroyum.

Við heilsan

P/F JANUAR
løggilt grannskoðanarvirki

Heini Thomsen
nevndarformaður, statsaut. revisor

Jógvan Amonsson
stjóri, statsaut. revisor